# Julian spælir í Svøríki

**Síðsti føroyingurin, sum fær góð skoðsmál í Íslandi, skal í Europa Cup skal í kvøld royna seg á útivølli saman við liðfeløgunum í ÍA**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Einasti føroyingurin, sum framvegis luttekur í europeisku fótbóltskappingunum, er Julian Johnsson. Í kvøld skulu hann og liðfelagarnir í ÍA spæla í Svøríki. Í øðrum innleiðandi umfarinum í UEFA Cup kappingini, skulu teir spæla á útivølli ímóti Hammarby.

Einki er at ivast í, at uppgávan og avbjóðingin verður ivaleysa stór hjá íslendska felagnum, sum við 5-0 sigri á Akureyri sunnudagin ímóti KA styrkti sær sjálvsálitið. Julian Johnsson var ta ferðina, sum hann mest sum hvørja ferð higartil í ár hevur verið tað, á ÍA miðvøllinum allar 90 minuttirnar. Í íslendskum fjølmiðlum fær hann sera gott skoðsmál fyri at vera sannur stríðsmaður. Tað kemur heilt víst ikki óvart á føroyingar við áhuga fyri fótbólti. Julian hevur altíð verið stríðsmaður og arbeiðshestur, og tað er hann framvegis.

Týsdagin varð møguleikin nevndur, at Julian kanska ikki fór at verða tøkur til landsdystin ímóti Malta. Orsøkin var, at ÍA orsaka av UEFA Cup ferðini í Svøríki hevði heitt á KSÍ, sum er íslendska fótbóltssambandið, at útseta landskappingardystin sunnudagin til mánakvøldið. Nú hevur KSÍ svarað. Teir siga nei. Tískil skal ÍA spæla sunnudagin, og so fer tað at bera til hjá Juliani at vera í Føroyum kanska sunnukvøldið og í hvussu so er mánamorgunin.

# Stórtrívist sum áleypari

**Rógvi Jacobsen úr HB er einsamallur á odda á toppskjúttaralistanum í 1. deild. Landsliðsleikarin, sum upprunaliga er miðvallarleikari, sigur seg stórtrívast sum áleypara.**

TOPPSKJÚTTI
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nú 11 umfør eru leikt í landskappingini í 1. deild, er Rógvi Jacobsen úr HB á odda á toppskjúttaralistanum við níggju málum, eitt meiri enn landsliðsfelagin Súni Olsen úr GÍ.

## Góðir viðleikara gera tað lætt

Rógvi Jacobsen sigur, at tað er lætt at verða so ovarlaga á málskjúttaralistanum, tá ið man hevur so góðar viðleikarar, sum hann hevur í HB. - Eg haldi, at eg havi skorað sjey av mínum níggju málum við høvdinum, og høvuðsorsøkin til tað er, at vit í Jákupi á Borg og Heðin á Lakjuni hava tveir framúr góðar vengur, sum leggja eina rúgvu av góðum innleggum, sum tað er lætt at senda í mál, sigur Rógvi Jacobsen.

Klaksvíkingurin sigur, at hann einaferð áður hevur ligið so mikið ovarlaga, og tað var í 1999, tá ið hann var við til at vinna greipuna við KÍ. - Tá lá eg einaferð á odda við sjey málum, men tá var kappingin ikki komin so mikið langt, sum hon er nú, sigur hann.

Tað er eingin loyna, at upprunaplássið hjá Rógva Jacobsen er á miðvøllinum, men í HB hevur hann seinnu árini fyri ein stóran part verið nýttur sum áleypari, og tað hevur hepnast væl. Rógvi sigur sjálvur, at hann altíð av og á hevur leikt heilt har frammi, og hann sigur seg stórtrívast sum áleypara. - Mær dámar sera væl at leika heilt har frammi, og eg haldi, at mín styrki er heilt inni í málteiginum, sigur Rógvi Jacobsen.

## Ísland lokkar

Spurdur, hvussu verður komandi ár, nú tað er greitt, at teir allarflestu av leikarunum hjá HB halda fram í felagnum, sigur Rógvi Jacobsen: - Eg veit einki enn. Eg taki tað, sum tað kemur, men eingin avgerð verður tikin enn, sigur hann.

Formaðurin hjá íslendska meistaraliðnum KR hevur alment sagt, at teir fegnir vilja hava Rógva til felagið, og fyrr í ár hoyrdi Rógvi okkurt frá felagnum, uttan at nakað tó spurdist burturúr. Rógvi sigur tó, at hann gott kundi hugsað sær at roynt eydnuna uttanlands, og hann heldur Ísland ljóðar lokkandi. - Eg meti, at tað hevði passað væl til mín at spælt í Íslandi, tí har er talan meiri um fysiskan fótbólt heldur enn poleraðan fótbólt, og tað riggar óivað betur til mín, sigur landsliðsleikarin, sum altso er toppskjútti í føroyskum fótbólti, nú ellivu umfør eru farin aftur um bak.



# Kofoed saman við vespunum

**Eftir at hava verið í FCK og GÍ roynir bornholmski álopsmaðurin seg nú í næstbestu deildini í Danmark**

FYRRVERANDI GÍ SPÆLARI
*Jóannes Hansen*

Tá ið hann í vár kom til Føroya og Gøtu varð vónað og kanska roknað við, at hann skuldi gera hol í sjógvin við málskjótingini hjá GÍ. Men tað megnaði hann ikki, og undan summarsteðginum fór hann av aftur landinum.

Tað er Vitus Kofoed, sum tað snýr seg um. Bornholmarin, sum hevur so mikið av grønlendskum blóði í sær, at hann er grønlendskur landsliðsspælari, hevur ofta skift felag seinastu tíðina. Eftir at hava roynt seg í FCK og GÍ, er hann aftur í Keypmannahavn, har hann roynir, hvussu langt evnini kunnu bera í Brønshøj. Hetta felagið flutti síðsta kappingarár niður í triði bestu deildina. Men tá ið FC Nordjylland fór á húsagang og harvið varð tikið úr næstbestu deildini, var aftur pláss fyri Brønshøj millum tey næstbestu.

Í Danmark verður Brønshøj nevnt fyri vespurnar. Higartil í hesum kappingarárinum hevur tað verið so sum so við broddinum. Teir hava tapt báðar landskappingardysturnar.

Týskvøldið vunnu teir í 2. umfari í steypakappingini. Mótstøðuliðið var FC Roskilde, sum ikki hoyrir heima í divisiónunum. Teir høvdu heimavøll, og tað tók sína tíð, áðrenn teir vórðu koppaðir. Brønshøj vann 7-5 eftir longda leiktíð og brotssparkskapping. Eftir vanliga leiktíð stóð á jøvnum 3-3, og í longdu leiktíðini fingu liðini hvør sítt mál.

Vitus Kofoed var fyri fyrstu ferð á Brønshøj liðnum týskvøldið, men hann taldist ikki millum málskjúttarnar.

## Støðan, 1. deild menn

| | | dystir | v-j-t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | HB | 11 | 8-2-1 | 29 | 10 | 19 | 26 |
| 2 | B36 | 11 | 6-3-2 | 22 | 12 | 10 | 21 |
| 3 | Skála | 11 | 6-2-3 | 22 | 14 | 8 | 20 |
| 4 | GÍ | 11 | 5-2-4 | 20 | 22 | -2 | 17 |
| 5 | VB | 11 | 4-4-3 | 16 | 12 | 4 | 16 |
| 6 | NSÍ | 11 | 4-3-4 | 16 | 16 | 0 | 15 |
| 7 | EB/S | 11 | 4-2-5 | 17 | 18 | -1 | 14 |
| 8 | KÍ | 11 | 2-7-2 | 16 | 13 | 3 | 13 |
| 9 | ÍF | 11 | 2-1-8 | 16 | 35 | -19 | 7 |
| 10 | B68 | 11 | 0-2-9 | 9 | 31 | -22 | 2 |

## Støðan, 2. deild menn

| | | dystir | v-j-t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 10 | 7-0-3 | 27 | 14 | 13 | 21 |
| 2 | AB | 10 | 6-2-2 | 18 | 13 | 5 | 20 |
| 3 | B71 | 10 | 6-1-3 | 29 | 23 | 6 | 19 |
| 4 | Royn | 10 | 6-0-4 | 26 | 21 | 5 | 18 |
| 5 | Sumba | 10 | 4-3-3 | 16 | 16 | 0 | 15 |
| 6 | FSV | 10 | 4-2-4 | 32 | 22 | 10 | 14 |
| 7 | B36 | 10 | 3-2-5 | 14 | 26 | -12 | 11 |
| 8 | KÍ | 10 | 2-3-5 | 21 | 26 | -5 | 9 |
| 9 | LÍF | 10 | 2-3-5 | 14 | 24 | -10 | 9 |
| 10 | VB | 10 | 0-4-6 | 9 | 21 | -12 | 4 |

## Máltindurin

*1. deild menn*

| | | |
|---|---|---|
| Rógvi Jacobsen | HB | 9 |
| Súni Olsen | GÍ | 8 |
| John Petersen | B36 | 7 |
| Sonni L. Petersen | EB/S | 7 |
| Heine Fernandez | HB | 7 |
| Jacob Bymar | KÍ | 6 |
| Bogi Gregersen | Skála | 6 |
| Krzystof Popczynski | GÍ | 5 |
| Jonhard Frederiksberg | Skála | 5 |
| Sorin Anghel | EB/S | 4 |
| Rúni Nolsøe | HB | 4 |
| Høgni Zachariassen | ÍF | 4 |
| Magni á Lakjuni | ÍF | 4 |
| Erling Fles | KÍ | 4 |
| Mindaugas | VB | 4 |

adidas

## Dystir: 15. august 2004

B36 - GÍ
B68 - NSÍ
EB/Streymur - KÍ
ÍF - Skála
VB - HB




# Starvsfólk til barnaansingina í Leirvíkar Kommunu

Til frítíðaransingina verður søkt eftir einum pedagogi at arbeiða 30 tímar/viku at byrja 01.oktober 2004 ella skjótast gjørligt.

Til barnagarðin verður søkt eftir einum hjálparfólki at arbeiða 25 tímar/viku at byrja 1. oktober 2004.

Løn samb. sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og FKA.

Skrivlig umsókn saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Leirvíkar Kommunu í hendi í seinasta lagi mánadagin 30. august 2004 kl. 12.00.

Um eingin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett fyribils.

Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til leiðaran Annu Djurhuus á telefon 443 125 ella 743 125.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42
520 Leirvík

# Lærarastarv við Gøtu skúla

**Við Gøtu skúla er hetta starv leyst at søkja í skúlaárinum 2004/2005.**

Vegna farloyvi verður søkt eftir lærara í tíðaravmarkað starv fyri skúlaárið 2004/2005. Starvið er fulltíðarstarv.

Umsøkjarar, sum kunnu undirvísa í gentuítrótti og kreativum lærugreinum, hava fyrimun.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkum 18.1-27.4.

Umsóknirnar skulu verða skúlastýrinum í hendi mikudagin. 18. august 2004.

Um nærri upplýsningar ber til at venda sær til skúlaleiðaran tlf. 441484 ella 210959.

**Gøtu Skúlastýri**
v/ Páll Jacobsen
510 Gøta

Gøtu Kommuna



# Bókhaldari søkist

til at arbeiða 1/2 tíð, at byrja skjótast gjørligt.

**Áhugað ringið á tlf. 503903**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar til A2 føðideildina

Á føðideildini A2 eru fýra føst størv sum sjúkrarøktarfrøðingur leys at søkja til setan 1. september 2004 ella eftir avtalu. Tey tvey av teimum eru á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum og hini bæði á starvsbrøki 0,6 í kvøld- og náttarvaktum.

A2 er ein deild við plássi fyri 12 mammum við børnum, 4 barnakonum og einari neonatalari eind, har vit royna, at hvørt einstaka barnið saman við foreldrum fær so góða byrjan sum gjørligt í lívinum. Deildin er spennandi við nógvum avbjóðingum, tvørfakligum samstarvi, góðari upplæring, undirvísing, og hon hevur tilrættislagda innleiðsluætlan. Á deildini eru royndir og virknir starvsfelagar.

**Førleikakrøv:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- faklig vitan og royndir
- góð samstarvsevni
- fleksibul og kreativ/ur
- røkjuskapur
- hug til tvørfakligt samstarv

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Upplýsingar um starvið:**
Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Sólfríðu Helmsdal, virkandi deildarleiðara, telefon 304500, lokal 5022 ella til Ceciliu Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102 ella e-post ceci@lsh.fo

Umsóknarfreistin er 27. august 2004 kl. 12.00.

Skrivlig umsókn, merkt »umsókn til starv« við avriti av prógvum, CV og viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

TANN EINASTI Í FØROYUM



Nissan Primera 2.0 GT
Árg. 98 koyrt 51.000km
Hevur m.a. fj. Sentrallás, alarm, ac, leðursetur
Anlegg við Subwoofer
Tilsølu fyri kr. 135.000,-

Tel. 211211

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
700 Klaksvík

# Sjúkrarøktarfrøðingur til deild M

Fast halvtíðarstarv sum sjúkrarøktarfrøðingur í skiftandi vaktum, er leyst at søkja á deild M til setan frá 1. september 2004, ella eftir avtalu.

Deild M er blandað medisinsk deild, við akuttari móttøku. - Deildin hevur 12 seingjarpláss. Arbeitt verður í tøttum samstarvi millum røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og læknar. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga og royndir innan medisinska øki
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- fakliga kompetantar og virknar starvsfelagar
- góða upplæring
- eitt umhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og verða við til at menna sjúkrarøktina
- eitt arbeiði sum er fjølbreitt, spennandi og sjálvstøðugt

Lønar-og setunartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til tlf. 455463, Synnøva Hansen deildarleiðari, lokal 403, e-post synnova@ksh.hospital.fo ella Jonu Nielsen, fyristøðukvinnu, lokal 106, e-post jona@ksh.hospital.fo

Umsókn við avriti av prógvi, autorisatión og møguligum viðmælum skulu sendast til

**Klaksvíkar Sjúkrahús**
att: Umsjónarmaðurin
FO-700 Klaksvík

Umsóknarfreist 20. august 2004.

# Til sølu

## Ford Focus Station

**1.8 Turbo Diesel**
**Í sera góðum standi**
**Árg. 1999**
**Koyrt 96.000**
**Kr. 125.000,-**
**Útgjald bert kr. 25.000,-**
***Restina práta vit um***

Sí onnur tilboð á www.bilfridkan.fo

**Bilfríðkan á Hjalla**
*Tel 35 73 00 ella 21 73 00*
*landsins lagaligasta brúktbilafígging*

Sosialurin 341800